## Noreg toppar í javnstøðu

Noreg endaði ovast á listanum yvir lond í heiminum í minking av javnstøðugloppinum, tætt fylgt av trimum øðrum Norðurlondum, nevnliga Finnland, Svøríki og Ísland. Hetta vísir ein nýggj kanning sum WEF, World Economic Forum, hevur gjørt. Í fjør endaði Svøríki á ovasta plássi, meðan Noreg fekk eitt triðja pláss. »Betri umboðan av kvinnum í ovari leiðslustørvum í stjórnum og fíggjarstovnum er lívsneyðug, ikki bert fyri at finna loysnir til verandi fíggjarkreppu, men eisini til at forða fyri at slíkar kreppur stinga seg uppaftur í framtíðini«, sigur Klaus Schwab, stovnari og formaður í WEF.

*Kelda: news.bbc.co.uk*



# Býráðið í Klaksvík fekk sekk

**Meir enn helvtin av teim 11, sum vórðu vald í Klaksvíkar býráð í gjár, eru nývald. Fíggjarkreppan hjá kommununi sást aftur í valinum, har bæði borgarstjórin og varaborgarstjórin høvdu vánalig val. Hóast eingin greiður persónligur vinnari var, fekk Fólkaflokkurin besta vali og fær væntandi borgarstjóran**

VAL

*Orð og myndir: Dorit Hansen*

Tað var stórur spenningur rundan um borðini, tá atkvøðurnar vórðu taldar upp í KÍ-høllini í Klaksvík í gjárkvøldið. Meðan bunkarnir vuksu, komu alsamt fleiri valevni og stuðlar inn í høllina at kanna, hvussu støðan var. Tey høvdu frætt, at atkvøður høvdu flutt seg og at høvd fóru at rúka. Nógv troðkan var rundan um borðini, og valstýrisformaðurin talaði at og heitti á fólk at flyta seg frá borðunum, tí ringt var at telja upp millum spentu politikararnar.

Tá uppteljingin endiliga var liðug, kundi valstýrisformaður staðfesta tað, sum bunkarnir longu tíðliga á kvøldi vístu. Klaksvíkar býráð var útskift. Men úrslitið vísti eisini, at veljarnir í Klaksvík ikki høvdu nakran týðuligan persónligum favorit. Eingin einstaklingur fekk nakað kanónval.

### Nýggjur fólkaflokkur

Fólkaflokkurin fekk nógv flestar atkvøður. Til seinasta val fekk flokkurin 36,15 prosent av atkvøðunum. Hesuferð fekk hann heili 41,26 prosent av øllum atkvøðunum í Klaksvíkar kommunu. Flokkurin hevur tí nú fimm býráðslimir í mun til fýra undan valið.

Men hóast flokkurin hevði eitt fínt val, og eftir øllum at døma fær borgarstjórasessin í einari komandi samgongu, so hevði flokkurin ongan greiðan persónligan vinnara. Gunnvá við Keldu fekk flestar atkvøður 188. Til samanbering kann sigast, at pápin, Jógvan við Keldu fekk 315 atkvøður í 2000. Atkvøðurnar hjá Gunnvá vóru tó fleiri enn tær, sum fremstu valevnini hjá Fólkaflokkinum fingu við seinasta val.

Flokkurin fekk ein býráðslim afturat, men heili trý á listanum eru nývald. Elsebeth G. Hansen, løgreglukvinna, fekk 178 atkvøður, Óli M. Lassen, siviløkonomur, kom inn við 159 atkvøðum, og formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna, Auðunn Konráðsson fekk 143 atkvøður. Síðst valdur er Atli S. Justinussen við 130 atkvøðum. Hann sat eisini í undanfarna býráð.

Taparin á Fólkaflokslistanum gjørdist Kristian Fríðrik Olsen, varaborgarstjóri. Við Sosialin sigur Kristian Fríðrik, at veljarnir hava revsað hann fyri fíggjarkreppuna hjá kommununi.

Sum varðaborgarstjóri havi eg fingið ein part av ábyrgdini fyri fíggjarstøðuna. Men hini valevnini á Fólkaflokslistanum hava eisini rikið hart, og eg má bara viðganga, at tey hava duga væl, sigur fráfarandi varaborgarstjórin.

Gunnvá við Keldu fegnast um úrslitið hjá Fólkaflokkinum.

Valúrslitið sigur, at fólkið vil broyting, og nú er tað upp til Fólkaflokkin at gjøgnumføra hesa broyting. Tey seinastu fýra árini eru nógv kompromis gjørd við Tjóðveldi. Men nú hava vit møguleikan veruliga at seta okkara fingramerki á, sigur fyrst valda valevni hjá Fólkaflokkinum.

Hon vísir á, at hóast stóra útskifting, hevði flokkurin eitt betri val hesuferð enn seinast. Og fólkaflokspolitikkur hevur tí fingið eina álitisváttan frá borgarunum í Klaksvík.

### Tjóðveldi tapti

Flokkurin hjá borgarstjóranum, Steinbjørn O. Jacobsen, má sigast at vera stóri taparin á valinum í Klaksvík í gjár. Hóast Tjóðveldi hevði níggju valevni í mun til trý seinast, so fekk flokkurin nógv færri atkvøður hesu ferð. Samlaða atkvøðutali hjá Tjóðveldi í Klaksvík var 561 atkvøður. Hetta svarar til 19,30 prosent. Við seinasta val fekk flokkurin 25,6 prosent av atkvøðunum. Úrslitið av hesari afturgongd er, at flokkurin hevur ein býráðslim minni.

Seinasta val fekk Steinbjørn O. Jacobsen 391 atkvøður, hesuferð fekk hann einans 169. Hetta er eisini minni enn hann fekk við næstseinasta val, tá hann fekk 229. Men hann var hóast alt afturvaldur, og tað fegnast hann um.

Aftaná allan ágangin, sum hevur verið ímóti kommununi seinastu tíðina, so eri eg ikki kløkkur av úrslitinum. Eg havi havt ovastu ábyrgd, og eg taki



*Toppskorarin í Klaksvík, Gunnvá við Keldu, heilsar upp á nýggja starvsfelagan, Auðunn Konraðsson. Eyðgunn Samuelsen var afturvald, men Javnaðarflokkurin fekk ikki nakað kanónval*



*Hjá Fólkaflokkinum vóru bæði vinnarar og taparar. Formaðurin í Meginfelag útróðróðramanna andlit til andlit við taparan á fólkaflokslistanum, fráfarandi varaborgarstjóra, Kristian Fríðrik Olsen*





*Nýggi sjálvstýrismaðurin í Klaksvíkar Býráð, Jógvan Skorheim, sum kom í eina lyklastøðu beinanvegin, tí Fólkaflokkurin bert tørvaði ein persón fyri at hava merilutan*